## Landsfelag Sjálvstýrisfloksins

**heldur ársaðalfund og landsfund**

## í Skálanum í Klaksvík

**leygardagin 3. november kl. 13.00.**
**Dagsskrá sambært lógina.**

Landsfundurin viðger politisk mál og politisku støðuna.

Um kvøldið verður døgverði v/undirhaldi.

Skipað verður fyri farti báðar vegir, sigið frá hjá økisfelagnum ella hjá Landsfelagnum, haðani eisini meira fæst at vita.

**Landsnevndin**
Tlf. 422430 ella 422292
E-mail: thala@post.olivant.fo
Tlf. 215482, Norðoya Sjálvstýrisfelag

## Sølu/Marknaðar-leiðari

Eitt spennandi og áhugavert starv sum sølu- og marknaðarleiðari er leyst at søkja hjá **P/f Vónini.**

Arbeiðsuppgávurnar fevna um sølu og marknaðarføring innanlands eins væl og uttanlands.

Tann, sum settur verður, má m.a. vera kønur í norðurlendskum og enskum máli, vera vanur við telduarbeiði og eiga at vera førur fyri at leggja søluarbeiðið væl til rættis.

Arbeiðið er sera spennandi, fjølbroytt og sjálvstøðugt, og í sera góðum arbeiðsumhvørvi.

Lønarviðurskifti og setanartreytir verða avtalað við leiðsluna.

Umsókn, saman við møguligum prógvum, eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. november.

**P/F Vónin**
Bakkavegur 22
Postboks 19
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 444246

**P/F Vónin**
Álaker
FO-100 Tórshavn
Tlf. 354391

MOUS
MS Excel Core 2000
6. & 7. Novembur
formula.fo
Skeið- og menningardeildin Tlf.: +298 311115 · www.formula.fo

## Goymslufólk

Hervið verður søkt eftir einum fólki m/k til goymslu okkara at byrja skjótast gjørligt.

Fyrimunur er, um umsøkjarin hevur goymslu- ella lærlingaútbúgving, men hetta er ikki nakað krav.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Svend Krosstein ella Jan Danielsen.

Hevur hetta tín áhuga, so send okkum eina umsókn.

**Svend Krosstein**
Falkavegur 6 - FO 110 Tórshavn
Tel. 314600 - Fax 314601
Teldupostur: sk@post.olivant.fo

Pf. Svend Krosstein er einasta VVS-heilsøla í landinum, og hevur eisini størsta VVS-handil í landinum. Vit selja m.a. alt tilfar til: kloakkleiðingar, vatnleiðingar, hita og sanitet og veiðireiðskap. Í fyritøkuni starvast í løtuni 16 fólk fulla tíð.

## Teknmálstulkur

Søkt verður eftir útbúnum teknmálstulki at byrja 1. jan. 2002.

Starvið er hálva tíð og er dag-, kvøld- og vikuskiftisarbeiði.

Løn samb. starvsmannafelagssáttmálanum.

Umsóknarfreistin er 1.12.2002.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum skulu sendast til:

**Teknmálstulkatænastan**
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn

Stórt úrval




-lágir prísir
og góð tilboð
Storno
Handan á 6 · 100 Tórshavn
tel 31 44 14 · fax 31 80 45

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Løgfrøðingur

**til Tórshavnar kommunu.**

**Arbeiðsøki**
Høvuðsarbeiðsøkið hjá løgfrøðinginum er hjá skattakærunevndini, sum er kærumyndugleiki hjá skattaborgarunum í Tórshavnar, Nólsóyar, Kirkjubøar og Hests kommunu. Uppgávurnar eru m.a at viðgera kærur og at virka sum ráðgevi hjá skattakærunevndini í løgfrøðiligum spurningum innan skattaøkið.

Umframt arbeiðið hjá skattakærunevndini, verður løgfrøðingurin eisini ráðgevi hjá fyrisitingini hjá kommununi, har uppgávurnar eru sera ymiskar og fjøltáttaðar. Nevnast kann m.a. byggimál og alment innlit.

**Boðið verður**
Eitt spennandi og fjølbroytt starv við flextíðarskipan. Arbeiðsuppgávurnar eru sera ymiskar og geva tær tí møguleika fyri stórari fakligari og persónligari menning.

**Førleikakrøv**
Útbúgving sum sum cand. jur. ella líknandi útbúgving. Tað er ein fyrimunur, at umsøkjarin hevur royndir innan almenna fyrisiting ella skattaøki.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og er í fyrstu syftu roknað til eitt ár. Løn sambært sáttmálanum millum fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Meira fæst at vita**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jens Marius Poulsen, kommunustjóra ella Leif Madsen, deildarleiðara tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 10. november 2001.

SNARSKIVAN

## Serflutningsbussur hjá Klaksvíkar Kommunu til sølu

Serflutningsbussur kommununnar verður hervið lýstur til sølu, um hóskandi boð fæst.

Bussurin, sum er av merkinum Ford Transit 2500 T/D, er góðkendur til 15 persónar, hevur lyftu til rørslutarnað og myndatól aftan. Hann er skrásettur fyrstu ferð í mai 1999.

Áhugað kunnu venda sær til Jancy Biskopstø Klein á Sosialu Deild, telefon 456388, ella Jan Askham í Smiðjuni, telefon 456387.

**Klaksvíkar Kommuna**

# Vikuskifti

Nr. 208 • leygardagur • 27. oktober 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

**Kvennkynsplágur**

Urd Johannesen skrivar um fartelefonina, sum vit ikki kunnu vera fyri uttan

Lesið á síðu 7



# Børn hugna sær í frítíðarskúlanum

**Dagliga eru 41 børn úr tveimum 1. flokkum úr Venjingarskúlanum á frítíðarskúlanum úti í Hornabø í Havn. Har spæla tey og hugna sær, til foreldrini koma aftur úr arbeiði**



## Áhugin fyri sjónleikinum drívur verkið

- Hetta er eitt ótrygt livibreyð, tí sum sjónleikari í Føroyum kanst tú missa arbeiðið, nær tað skal vera, sigur Hans Tórgarð

Lesið samrøðu á síðu 4-5



## Hon vælir um okkara tjóðararv

- Tað er mær ein stórur persónligur heiður at umvæla pappírsklipp hjá Williami Heinesen, sigur Tina Johannesen, pappírskonservator

Lesið á síðu 3



*Dreingirnir spæla í dreingjarúminum*

FRÍTÍÐARSKÚLI
*Ingrid Bjarnastein*

Børnini í frítíðarskúlanum eru full av orku. Tey renna runt allan dagin og spæla. Fýra starvsfólk og ein leiðari fylgja teimum gjøgnum seinnapartin.

– Tað er ógvuliga stuttligt at vera her, sigur sjey ára gamla Kristianna úr 1. a í Venjingarskúlanum. – Vit spæla, mála og byggja bátar. Í dag hava vit málað bløð.

Børnini hava nakrar fastar aktivitetir. Til dømis sleppa tey at vera í høllini á háskúlanum, har tey hava dansi- , sang- og bóltspøl. Stórt øki er rundan um frítíðarskúlan, har børnini kunnu spæla.

– Eg haldi eisini, at tað er stuttligt, at vera her, sigur sjey ára gamli Sverri, sum eisini gongur í 1. a í Venjingarskúlanum. – Vit plaga at spæla Police Force, sum er eitt spæl við monnum og bilum. Viðhvørt sita vit í hvílirúminum og lesa Dunnald Dunnu. Vit duga ikki at lesa tað, sum er skrivað, men vit hyggja bara eftir myndunum, og tað er eisini stuttligt.

Sjálvur frítíðarskúlin er eini sethús í trimum hæddum. Á miðhæddini er inngongdin, har køkur og spælistova er. Á loftinum er eitt sokallað genturúm við dukkum, koppastelli og øðrum gentuleikum. Eisini er eitt dreingjarúm har dreingirnir plaga at spæla bil og byggja torn.

Í kjallaranum er eitt hvílirúm. Har liggja madrassur á gólvinum og bløð til børnini at lesa. Inni í hvílirúminum hava børnini møguleika til at binda frið og hvíla seg eina løtu. Eitt sjónleikararúm við palli er eisini í kjallaranum. Har hava børnini møguleika at framføra sjónleikir. Síðsta rúmið í kjallaranum er arbeiðsrúmið, har børnini sleppa at mála, byggja bátar og annað.

Børnini syrgja fyri sær sjálvum tað mesta av degnum. Tey gera tað tey hava hug til og renna úti og spæla. Øll børnini eru samd um, at teimum dámar ógvuliga væl at vera á frítíðarskúlanum.